ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini ítróttin á alnetinum
www.sosialinum.fo

Rógvi rudda›i alla mótstø›u av vegnum

Vágbingurin Rógvi Johansen hevur vi› hesum sera sannførandi sigrinum í Statoil Kring Føroyar sligi› fast, at hann er nógv tann sterkasti súkklarin, sum føroyingar eiga. Hann hev›i ikki stórvegis trupulleikar at vinna samanlagt, men Gunnar Dahl-Olsen fekk loyvi at vinna ta seinastu etapuna sunnudagin

Rógvi Johansen vi› steypi og blómum vann sannførandi Statoil Kring Føroyar og fekk eisini 4.000 krónur fyri ómakin

STEFAN Í SKORINI

Vi› tí sterka Shell li›num aftanfyri seg gjørdi Rógvi Johansen sína skyldu og vann Statoil Kring Føroyar sera sannførandi vi› fleiri minuttum aftur til næsta mannin, sum var li›felagin hjá Rógva, Jørgen Andersen. Hinir á Team Shell vóru Janus Jørgensen, Gunnar Dahl-Olsen og Simon Borchmann.

Gunnar slapp eisini framat

Á seinastu etapuni sunnudagin slapp Gunnar Dahl-Olsen framat. Taktikkurin hjá Team Shell var, at Gunnar skuldi sleppa avsta› og vinna etapuna fyri li›i›. Taktikkurin eydna›ist eisini til fulnar, og Gunnar tók møguleikan, sum honum var› litin upp í hendi.

Gunnar fór frá høvu›sfeltinum beint á›renn tunnilin í Kollafir›i, og Kenneth Gormsen fór aftaná. Hetta vísti seg at ver›a gott fyri Gunnar, tí at so var lættari at halda frástø›una til hinar allan vegin til Havnar, og Gunnar dró longra strái› tá samanumkom.

Onkur misskiljing hendi á málinum, tí at tá Jens Tousgaard, sum enda›i á tri›ja plássi, kom á mál, helt hann seg hava vunni›, men hann hev›i eitt umfar eftir. Fleiri a›rir súkklarar vóru eisini úti fyri tí sama sum Tousgaard. Eisini er at fílast á, at fleiri fer›ir var nær vi› at súkklararnir stoyttu saman vi› ásko›arar, sum gingu á vegnum vi› máli, og ta› átti ikki at komi› fyri. Ta› er altí› óheppi› at slíkt kemur fyri, og ta› gevur fyrireikarunum naka› at hugsa um til næsta ár.

Alt avgjørt eftir fyrstu etapu

Í prologinum í Klaksvík mikudagin fingu vit eina ábending um, hvussu sterkt Shell li›i› var, tí at fimm av seks teimum fremstu vóru allir Shell menn. Á tí fyrstu veruligu etapuni í Eysturoynni arbeiddi li›i› væl saman, og Rógvi leg›i veruliga sjógv millum seg og restina av feltinum. Hann var tá f‡ra minuttir frammanfyri næsta mann, og tá var kappingin í roynd og veru avgjørd. Team Shell skuldi bara hava tann rætta taktikkin, og so kundi Rógvi tryggja sær sigurin, og tær f‡ra túsund krónurnar, sum fylgdu vi› sigrinum.

Rógvi vann eisini einkultstartin á Sandoynni og etapuna í Su›uroynni, og hann hevur vi› hesum sta›fest, at hann er okkara besti súkklari í løtuni. Onkur vildi vera vi›, at Team Shell var sum at skjóta spurv vi› kanónum. Ta› er óiva› naka› um ta›, tí at hetta vóru teir sterkastu súkklararnir í feltinum, sum høvdu tiki› seg saman og skuldu syrgja fyri, at Rógvi koyrdi sigurin heim, og hann sveik heldur ikki áliti›.

Gunnar Dahl-Olsen hála›i seg vi› sigrinum av fimta fram á tri›ja pláss, me›an Jørgen Andersen megna›i at var›veita anna› plássi›, og Simon Borchmann gjørdist nummar f‡ra. F‡ra teir fremstu vóru á Team Shell, sum veruliga hevur dominera› í ár.

Tá i› vir›islønirnar vór›u handa›ar var Gunnar Dahl-Olsen á ø›rum plássi og Simon Borchmann á tri›ja, men eitt mistak var› gjørt í uppger›ini, so at Jørgen Andersen var›veitti hóast alt sítt anna›pláss, og hinir bá›ir duttu so eitt pláss ni›ur.

Annars hava flestu súkklarar sagt, at Statoil Kring Føroyar eydna›ist sera væl, og ve›ri› hevur eisini skikka› sær avbera væl í ár eins og í fjør, og ta› hevur ikki gjørt kappingina verri.

Fyrstu fer› vi› li›um

Kaj Leo Johannesen, sum vegna b‡rá›i› handa›i vir›islønirnar, seg›i, at súkkling hevur í Føroyum ikki veri› ein ítróttargrein, har kappast hevur veri› í li›um. Ta› er nú broytt, tí at sama dag, sum kappingin skuldi fara av bakkastokki, avdúka›u fimm súkklarar, at teir fóru at koyra saman í einum li›i, kalla› Team Shell. Hetta hev›i vi› sær, at kappingin næstan var avgjørd, á›renn hon var byrja›.

Í fjør koyrdu Bogi Kristiansen og a›rir súkklarar eisini saman í einum li›i, men hetta kom ikki fram fyrr enn aftaná kappingin var li›ug. Teir fimm í Team Shell valdu ikki at halda teirra li› loyniligt, men at gera øllum greitt, at teir koyrdu saman.

Í Statoil Kring Føroyar 2000 var bara eitt li› vi›, og ta› hev›i vi› sær, at a›rir súkklarar ikki høvdu nakran møguleika at gera seg galdandi, men hetta fer væntandi at broytast næsta ár. Roynt var›, at fáa súkklarar úr Ynes Mon og Hetlandi vi›, men skotbrái› var ov stutt, so hetta var av ongum. Næsta ár ætla fyrireikararnir at ver›a í gó›ari tí›, so at enn fleiri lond skulu ver›a umbo›a›, og tá ver›a kanska fleiri li› vi›, so at kappingin gerst meira spennandi.

Statoil Kring Føroyar hevur gjørt sítt til, at føroysk súkkling hevur tiki› seg fram, og kappingin í ár vísti, at stø›i› er hækka›. Eitt súkklufelag er stovna› í Havn, og nøkur venja eisini individuelt runt um í landinum, og ta› er at gle›iligt at síggja, at meira ótraditionellar ítróttargreinar taka seg fram í Føroyum.